Búskapur og vinna:

## Hægri húsaprísir

Norska byggivinnan væntar, at húsaprísirnir í Oslo og summum landspørtum fara at hækka nógv tey næstu árini, og eftir metingini fara prísirnir í Oslo, Akershus, Sør Trøndelag og Troms at hækka til tað tvífalda innan 2008.

Í dag kostar ein íbúð í Oslo umleið 20.000 krónur fermeturin, men sambært byggivinnuni verður prísurin um 40.000 krónur í 2008. Felagið hjá byggivinnuni sigur, at tað hevur nýtt búskapargongdina í Noregi tey seinastu árini sum grundarlag fyri sínum metingum.

## Styrkja DONG

Danska stjórnin hevur gjørt av at styrkja tað almenna oljufelagið Dansk Olie og Naturgas, DONG. Í fyrsta umfari er ætlanin, at tað norðursælendska elfelagið Nesa skal leggjast afturat DONG, men ætlandi verða fleiri samanleggingar í framtíðini.

Leiðslan í Dansk Olie og Naturgas sigur, at donsku orkufeløgini eru sera smá, um tey verða borin saman við orkufeløg uttanlands. Tað merkir, at donsku feløgini kunnu ikki standa seg í kappingini við útlendsku feløgini, og tí er neyðugt at leggja fleiri feløg saman, sigur leiðslan í DONG.

## Skuldin minkar

Ein uppgerð hjá danska Tjóðbankanum vísir, at danska uttanlandsskuldin minkar støðugt. Á nýggjárinum skyldaðu danir 513 mia. krónur uttanlands. Tað var 25 mia. krónur minni enn fyri einum ári síðani, og Tjóðbankin væntar, at skuldin fer at mina 30 mia. krónur í ár.

Uppgerðin hjá Tjóðbankanum vísir eisini, at danir rindaðu 37 mia. krónur í rentum av uttanlandsskuldini í fjør.

UTTAN ÚR HEIMI

# Blóðugir dagar í Miðeystri

**Síðani mánadagin hava 32 palestinar og 10 ísraelsmenn latið lív hevndarálopum í Ísrael og teimum palestinsku økjunum**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

Týsdagin doyðu seks ísraelskir hermenn, tá víðgongdir palestinar lupu á teir nærhendis bygdini Ein Arik tætt við býin Ramallah á Vestara Áarbakka. Hetta var seinnapartin. Fyrrapartin sama dag royndi ein palestinskur sjálvmorðsbumbumaðiur at spreingja ein ísraelskan buss í luftina, men atsóknin miseydnaðist.

Í gjár kom ísraelska svarið. Fyrst søktu ísraelsk herskip at málum í Gaza-geiranum, og seinni lupu jagaraflogfør og tyrlur á Gazabý. Fýra hermenn í teirri sonevndu Deild 17 hjá palestinsku myndugleikunum doyðu í álopunum. Hetta var fyrstu ferð í næstan hálvt annað ár, at ísraelsmenn søktu at skrivstovunum hjá palestinsku sjálvsstýrismyndugleikunum í Gaza-býi.

Gjáranáttina lupu ísraelsk flogfør og tyrlur á fleiri mál í Ramallah við rakettum, samstundis sum fleiri stríðsvognar fóru inn í býin. Rakettirnar raktu fleiri bygningar, teirra millum eina skrivstovu hjá palestinsku fregnartænastuni. Hendan skrivstovan var í somu húsum, sum palestinski leiðarin, Yasser Arafat, hevur hildið til í, síðani ísraelsku myndugleikarnir sýttu honum at fara úr Ramallah. Palestinska trygdartænastan boðaði aftan á álopið frá, at Arafat sjálvur hevði ikki fingið skaða, men at tveir av hansara lívverjum høvdu latið lív.

Í gjár frættist eisini, at ísraelskir hermenn høvdu skotið níggju palestinskar løgreglumenn í einari bygd nærhendis Ramallah.



*Daglig sjón í Ísrael. Her eru tað ísraelskir hermenn, sum syrgja ein vinmann, sum doyði í einum álopi týsdagin.*

*Mynd: Reuters*

### Heldur stríð enn frið

Ísraelski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, hevði í gjár fund við serligu trygdarnevndina hjá stjórnini. Sambært ísraelska útvarpinum umrøddi nevndin, hvussu farast skal fram í stríðnum við palestinar.

Ætlanin var, at Shimon Peres, uttanríkisráðharri skuldi fara til Spania at hitta José Maria Aznar, forsætisráðharra, men ferðin varð avlýst í gjár. Peres hevur ætlanir um at leggja fram eina friðarætlan, men høgravongurin í stjórnini heldur tað vera rættari at herða tey hernaðarligu tiltøkini ímóti palestinunum, og eygleiðarar siga, at ísraelsku álopini á Gazabý og Ramallah eru tekin um, at Sharon og hansara viðhaldsmenn hava vunnið hetta stríðið.

# Gøla um pedofilar prestar skakar USA

**Katólskir prestar í Boston hava í fleiri ár misnýtt fleiri hundrað børn og ung**

USA
*Árni Joensen:*

Amerikanarar er skelkaðir, eftir at tað er komið fram, at nógvir katólskir prestar í býnum Boston hava misnýtt hundraðtals børn og ung. Eftir tí, sum higartil er komið fram, hava umleið 90 prestar hava misnýtt børnini og tey ungu, og hetta hevur staðið við í nógv ár.

Gølan byrjaði, tá blaðið The Boston Globe fór at kanna søguna um prestin John Geoghan, sum herfyri varð dømdur sekur í at hava misnýtt ein tíggju ára gamlan drong fyri góðum tíggju árum síðani. Hann varð eisini skuldsettur fyri at hava misnýtt fleiri onnur børn og ung, men tað eydnaðist kirkjuni at loysa tey málini við at rinda teimum misnýttu og foreldrum teirra meiri enn tíggju milliónir dollarar í endurgjaldi.

Men nú hevur The Boston Globe avdúkað, at ovasti leiðarin í katólsku kirkjuni í USA, kardinalurin Bernard F. Law, var vitandi um, at John Geoghen misnýtti børnini. Law var erkabiskupur í Boston í 18 ár, áðrenn hann gjørdist kardinalur, og í áttatiárunum fekk hann at vita, hvat Geoghen tókst við. Kortini setti erkabiskupurin Geoghen í starv, hvørja ferð hesin ynskti at flyta til onkra aðra kirkju at arbeiða.

Kardinalurin hevur síðani biðið um umbering fyri tað, sum hendi. Sjálvur sigur hann, at hetta var eitt mistak, og hann vissaði samstundis amerikanska fólkið um, at børnini skulu kenna seg trygg saman við teimum prestunum, sum nú virka í katólsku kirkjuni í USA.

Men longu dagin eftir var aftur galið. Tá kom fram, at fyrst tveir og seinni seks virkandi prestar hava gjørt seg inn á børn og ung. Nú krevja mong, at hetta skal fáa avleiðingar fyri leiðsluna í katólsku kirkjuni í USA.

Úr Norðurlondum:

## Stríð kostar

Norski Arbeiðaraflokkurin hevur nú so lítla undirtøku í fólkinum, sum flokkurin ikki hevur havt í mong ár, og formaðurin í bróðurflokkinum í grannalandinum Svøríki ivast ikki í, at stríðið um formansstarvið í norska flokkinum er ein stór orsøk til gongdina. Gøran Persson heitir tí inniliga á teir báðar oddamenninar í Arbeiðaraflokkinum, Thorbjørn Jagland og Jens Stoltenberg, um at binda frið og leggja dent á tað politiska arbeiðið heldur enn formansstarvið.

## Bók um svik

Norski fiskaútflytarin Jarle Kvalheim fekk herfyri meiri enn seks ára fongsul fyri at hava svikað við meirvirðisgjaldinum. Hann hevur avgjørt at kæra dómin, men skuldi dómurin verið staðfestur, verður Jarle Kvalheim ikki arbeiðsleysur.

Hann boðaði týsdagin frá, at hann fer at skriva eina krimisøgu um vik í fiskivinnuni, og sambært tí komandi høvundinum er ov mikið at taka av. Sjálvur hevur hann verið í virkin í vinnuni í umleið 30 ár, og hann sigur seg hava nógv dømi um, at fólk og fyrtøkur hava svikað við meirvirðisgjaldi og øðrum almennum reglum, men at tey forvitnu noyðast at bíða eftir bókini.

## Undir umsiting

Tann nógv umrødda danska kommunan Farum er nú sett undir umsiting. Býráðið dugdi ikki at greiða innanríkisráðnum frá, hví kommunan er komin í tað fíggjarliga óførið, sum hon er í, og tí skal innanríkisráðið nú halda eygað við øllum, sum býráðið ger.

M. a. kom fram, at kommunan hevur lænt 450 mió. krónur til jarðarkeyp, men at jørðin kostaði 190 mió. krónu. Hvat hinar 260 mió. krónurnar eru nýttar til, dugdi býráðið ikki at siga innanríkisráðnum. Tær eru so ikki í kommunukassanum, tí har resta næstan 90 mió. krónur í fyri at fáa javnvág.



Leikfólk í barnavernd:

# Kommunalpolitikarum vantar nærlagni

**Hóast tað finnast borgarar við viðkomandi fakligum førleika í flestu kommununum í landinum, so verða barnaverndirnar kring landið kortini mannaðar við meira ella minni tilvildarliga valdum leikfólki. Hetta er ábyrgdarleyst av politikarunum, heldur limur barnaverndini í Vestmanna**

BARNAVERND
*Rúnar Reistrup*

- Tað er óheppið, at barnaverndirnar kring landið eru mannaðar við leikfólki heldur enn fólki við fakligum kunnleika . Men sjálvari barnarverndarskipanini er einki galið við. Trupulleikin liggur hjá fólkavaldu kommunalpolitikarunum, sum velja so at siga tilvildarlig fólk í barnaverndarnevndirnar, heldur enn at brúka tey fakfólkini, sum finnast í kommununi.

Tað heldur Birgir Waag Høgnesen, sum sjálvur er skrivari í barnaverndarnevndini í Vestmanna kommunu. Hann metir tað vera beinleiðis ábyrgdarleyst av kommunalpolitikarum, tá teir velja at manna barnaverdnarnevndir eina við leikfólki.

- So at siga hvør kommuna hevur borgarar, ið, við tað at teir til dømis eru lærarar, sjúkrasystrar, pedagogar, politistar og annað, hava fakligan førleika á økinum, men kortini verða leikfólk vald at sita í barnaverndini. Hetta er ein trupulleiki, tí barnaverndirnar hava brúk fyri fakligum førleika, sigur skrivarin í barnaverndini í Vestmanna, sum sjálvur er tryggingarmaður.

- Eg veit ikki, hví júst eg skal sita í barnaverndini, tá bygdin er á tremur við fólki, ið fakliga hava nógv betri kvalifikatiónir at røkja hetta arbeiði, enn eg havi.



*- Eg veit ikki, hví júst eg skal sita í barnaverndini, tá bygdin er á tremur við fólki, ið fakliga hava nógv betri kvalifikatiónir at røkja hetta arbeiði, enn eg havi, sigur Birgir Waag Høgnesen, limur í barnaverndarnevndini í Vestmanna*

### Einki galið við skipanini

Í grein í blaðnum í gjár førdi Jancy Biskopstø Klein, leiðari á Sosialu Deild í Klaksvík, millum annað fram, at kommunalu barnaverndarnevndirnar ofta eru ókvalifiseraðar til at røkja sína uppgávu mótvegis børnunum og samfelagnum, tí tær eru mannaðar av leikfólki, ið ikki hava neyðuga førleikan at røkja uppgávuna hjá einari barnavernd.

Hesum er Birgir Waag Høgnesen fult samdur í. Men hann er ikki samdur við leiðaranum á Sosialu Deild í Klaksvík, tá hon sigur, at tíðin tískil er farin frá verandi skipan, har barnaverndirnar verða politiskt valdar.

- Tað er einki í barnaverndarskipanini, sum forðar kommunalpolitikarunum í at velja fólk við hóskandi fakligum førleika í barnaverndarnevndirnar. Men kortini velja politikararnir at seta húsmøðrar, skiparar og ein tryggingarmann sum meg at røkja arbeiðið. Tað er soleiðis eftir mínum tykki ikki skipanini tað er galið við, men heldur nærlagninum hjá kommustýrinum, tá leitað verður eftir fólki til barnaverdnirnar. Eg haldi, at har er tað ofta tilvildin, sum ræður.

### Málini ganga nær

- Trupulleikin við at barnaverdnirnar eru mannaðar við leikfólki er ikki, at hesi fólk ikki vilja ella ikki royna at gera sítt besta, men málini hava tað við at draga út, tí sakkunnleikin finst ikki í nevndini, og tað tekur tíð, tá nevndin allatíðina skal leita sær køna hjálp uttanifrá, heldur skrivarin í barnaverndini í Vestmanna kommunu.

Ein afturvendandi trupulleiki hjá landsins barnaverdunum er eisini, at málini ofta ganga barnaverndarlimunum nær. Her metir Birgir Waag Høgnesen eisini, at fakfólk eru betur búgvin til at skera ígjøgnum.

- Um vit fara útum Havnina og Klaksvíkina, so er søgan tann, at mestsum hvørt einasta mál gongur onkrum barnaverndarlim nær á onkran hátt. Tí er sera umráðandi at hava fólk í barnaverdnunum, sum kunnu handfara hesi mál professionelt, og tí skilji eg ikki, hví kommunalpolitikararnir ikki eru meira nærlagdir, tá teir finna fólk at manna barnaverndirnar, sigur Birgir Waag Høgnesen, skrivari í barnaverndini í Vestmanna kommunu.

Høvdavirkið, FMP í Leirvík:

# Hevur turkað 2.000 tons av høvdum

**30 vaksin fólk umframt 15-16 skúlanæmingar turka høvd á nýskapandi høvdavirkinum í Leirvík. Skúlanæmingarnir arbeiða eftir somu bonusskipan, sum hini fólkini á virkinum, og teir eru væl nøgdir**

*Vilmund Jacobsen*

FMP, Faroe Marine Products, eitur felagið, sum leygardagin, 8. september 2001 fór undir nýskapandi virksemið í Leirvík – at turka høvdu til nigerianska marknaðin við fjarhita frá brennistøðini hjá IRF.

Tað ljóðar kanska eitt sindur løgið, at virksemi byrjaði ein leygardag, men søgan er hendan:

FMP er eitt føroyskt/íslendskt felag, har føroyingar eiga 50% og íslendingar 50%. Íslendingar vildu, at framleiðslan skuldi byrja ein fríggjadag, tí tað merkir eydnu í Íslandi. Men í Føroyum er hesin dagurin ikki hin best dámdi til nýggja byrjan, tí hann merkir óeydnu. Føroyingar hildu, at mánadagurin var hin rætti at byrja, men mánadagur er óeydnisdagur í Íslandi; so tað bar heldur ikki til. Valið fall ímillum hesar báðar dagarnar, og tí fekk arbeiðsfólkið boð um at møta til arbeiðis leygardagin, 8. september.

### Stóra framleiðsluorku

FMP keypir høvd úr øllum landinum. Keypt verða toskarhøvd, upsahøvd og hýsuhøvd, sum verða løgd á rimar og turkað í eina góða viku ella so – alt eftir, hvussu stór ella smá høvdini eru. Síðan verða tey pakkað í hessian-sekkir og send niður á nigerianska marknaðin. Eirikur á Húsamørk sigur, at framleiðsluorkan á virkinum er 9.000 tons um árið, men hetta fyrsta árið hava teir sett nøsina upp ímóti 6.000 tonsum. - Higartil hava vit turkað 2.000 tons av rávøru. Vit turka vanliga góð 150 tons av toskarhøvdum um vikuna, og tað eru vit nøgdir við. Hitan, sum nýttur verður til turkingina, keypir virkið frá IRF, og Eirikur sigur, at hetta samstarv eru teir sera væl nøgdir við.

Upprunaliga er virkið hjá FMP bygd sum lýsivirki, men fótaði sær av ymiskum orsøkum ongantíð sum slíkt. Longu tá keypti virkið fjarhita frá IRF.

- Virksemið, sum nú er á virkinum, krevur nógv meira hita enn framleiðslan av rálýsi kravdi, og tí verður hitin nógv betri gagnnýttur nú.

Á FMP arbeiða 30 fólk vanliga frá kl. 8 til 16. Men tá ið nógv er at gera, hevur virkið 15-16 skúlanæmingar til arbeiðis frá kl. 16-20. Hesir arbeiða undir somu bonusskipan, sum hini fólkini, og næmingarnir eru væl nøgdir.

Eingin fær minni enn tímaløn, men ert tú ágrýtin og fær nógv frá hondini, tjenar tú eisini meira.



### Gott samstarv við íslendingar

FMP er stovnað við 4 milj. krónum í eginpeningi, og tað er nógvur peningur. - Hetta er eitt stórt og nýskapandi virki, og tí er neyðugt við stórum eginkapitali, sigur Eirikur.

*Eirikur á Húsamørk sigur, at tað hevði ikki latið seg gjørt at bygt upp hetta virksemi so skjótt, um teir ikki fóru út í hetta samstarv við íslendingar, sum hava 20-30 ára royndir í at turka og selja høvd*

*Mynd: Edvard Joensen*

Hann vísir á, at tað hevði ikki latið seg gjørt at bygt upp hetta virksemi so skjótt, um teir ikki fóru út í hetta samstarv við íslendingar, sum hava 20-30 ára royndir við hesi framleiðslu og marknaðinum, sum fyri føroyingar var meira ella minni ókendur.

- Royndir vórðu gjørdar í Syðrugøtu at turka høvd, men hesar hildu uppat, tá ið virkið brendi, leggur hann aftrat.

Laugarfiskur, sum er íslendski parturin við 45%, hevur 20 ára royndir innan framleiðslu og sølu av turkaðum høvdum. Eitt annað felag í Íslandi, Norðfish, eigur hini 5% av íslendska partinum.

Í Føroyum eigur Sp/f H. Konoy 45% og ein einstakur persónur hini seinastu 5%.

- Tað er neyðugt at læra at grulva, áðrenn tú lærir at ganga, og tá ið tú lærir teg at ganga, kann vera gott at hava onkran at halda í hondina á.

Annars kanst tú detta og sláa teg illa. Vit høvdu ongantíð megnað at bygt hesa framleiðslu upp so skjótt uttan íslendska hjálp, sigur Eirikur á Húsamørk.